Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# Ársfrágreiðing 2017

## *Felagið*

*Í nevndini í  Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sita:*

Annika Olsen, forkvinna, Tórshavn
Brandur Sandoy, næstformaður, Sandur
Pauli T. Petersen, nevndarlimur, Vestmanna
Jógvan í Skorini, nevndarlimur, Eiði
Bogi Bendtsen, nevndarlimur, SEV
Poul Andrias Joensen, nevndarlimur, IRF



## *Innihald*


1. Inngangur
2. Samráðingar 2017
3. Verkfall og verkbann
4. Evnisdagar og skeið
5. Arbeiðsbólkar
6. Flokkingarmál
7. Evnisdagur um sáttmálar á eldraøkinum
8. Visjónsarbeiðið
9. Skrivstovan
10. At enda

**1**

***Inngangur***

Góðu luttakarar!

Eg vil eg bjóða tykkum øllum hjartaliga vælkomin á ársfundin í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Hendan nevndin hevur nú sitið í eitt gott ár, og arbeiðslagið í nevndini er gott.

Í ársfrágreiðingini fari eg at siga frá virksemi felagsins í 2017.

Greitt verður frá gongdini í samráðingunum, sum tóku nógv av arbeiðsorkuni í undanfarna ári og fram til í dag.

Harumframt fari eg at vísa á nøkur av teimum mest týðandi evnum og málum, sum arbeitt varð við í undanfarna ári.

Hugt verður eisini frameftir og eftir teimum samráðingunum, sum eru fyri framman.

**2**

***Samráðingarnar í 2017***

Sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum fóru úr gildi 1. oktober 2017. Tí hevur nógv tíð og nógv orka verið nýtt til at fyrireika og at samráðast um nýggjar sáttmálar við tey ymsu feløgini.

Eftir fundin, sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevði við Fíggjarmálaráðið um samráðingarnar 2017 og eftir, at ein karmur varð lagdur í fyrstu samráðingunum millum

Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, so høvdu vit ein karm, sum vit vildu leggja okkum upp at, sum vanligt hevur verið.
Semjan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið byggir á ein 2 ára sáttmála við einum karmi á 695 kr. 1. oktober 2017 og 754 kr. 1. oktober 2018. Umroknað til prosent, so svarar tað til eina miðal lønarhækkan fyri allan almenna arbeiðsmarknaðin á 2,3% tað fyrra árið og 2,5% tað seinna árið.
Fyrstu samráðingarnar hjá okkum vórðu við Starvsmannafelagið og Pedagogfelagið.
Samráðingarnar millum ávikavist Starvsmannafelagið og Pedagogfelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið byrjaðu væl, men samráðingarnar, sum Fíggjarmálaráðið um sama mundið hevði við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar gingu minni væl, og tað endaði eisini við, at felagið tók stigið at fara í verkfall á sjúkrahúsunum.
Sum kunnugt varð ein heldur óvæntað og óvanlig semja gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, sum hevði ta avleiðing, at okkara samráðingarstøða gjørdist ein heilt onnur – hon breyt okkara áralongu siðvenju og skipan um samráðingarleist og hátt.
Eftir hesa semjuna millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar, sum gav sjúkrarøktarfrøðingum eina munandi hægri lønarhækkan, og sum harumframt varð givin í prosentum, so varð torført hjá okkum at koma víðari við byrjaðu samráðingum.
Fakfeløgini, sum vit samráddust við, komu nú við nýggjum og dýrari krøvum vísandi til, hvat Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevði fingið.

Tað, sum var serligt við hesari semjuni var, at hon breyt við tað, sum altíð hevur verið galdandi. Lønarkarmurin verður vanliga lagdur saman við fyrsta felagnum, og hetta varð nú broytt, tí tað vísti seg, at tað nú var talan um ein annan karm enn tann, ið Starvsmannafelagið hevði fingið og ein sáttmála, ið gekk longur fram enn ta tíðarskeiðið, hann er galdandi fyri.

Fyrsti fundur við Pedagogfelagið var tann 24. august 2017, tá krøv vórðu handaði. Vit høvdu fleiri samráðingarfundir, og størsta avbjóðingin var kravið um høgu endalønina eins og tann, sum sjúkrarøktarfrøðingarnir fingu, ið var alt ov kostnaðarmikið. Tá tað framvegis var alt ov langt ímillum partarnar á 7. samráðingarfundi, sum var tann 1. desember, og mett var, at støðan var so fastløst, so boðsendi arbeiðsgevarin semingsstovninum.
Fyrsta semingsroyndin var gjørd 9. desember, men báðir partarnir vrakaðu semingsuppskotið. Pedagogfelagið valdi eftir, at semingsuppskotið varð vrakað av báðum pørtum at lýsa verkfall fyri leiðarar og varaleiðarar á dagstovnum og dagrøktini á kommunala økinum, umframt fyri eindarleiðarar, leiðarar og samskiparar á stovnum undir landinum.
Sum aftursvar lýsti Kommunala Arbeiðsgevarafelagið verkbann á dagstovnaøkinum fyri bæði pedagogar og hjálparfólk, tí mett var ikki, at tað var ráðiligt at hava stovnarnar opnar í fleiri dagar uttan nakra leiðslu.
Verkfallið og verkbannið vardi frá 11. desember 2017 til 14. januar 2018.

Semingsstovnurin gjørdi aftur eina roynd at hava ein fund millum partarnar millum jól og nýggjár, men tá spurdist onki burturúr.
Tann 12. januar gjørdi semingsstovnurin enn eina roynd at fáa semju í lag, og leygarkvøldið 14. januar 2018 eydnaðist tað semingsstovninum at finna eina semju partanna millum, og skrivað varð undir semju.
Semjan hjá Pedagogfelagnum byggir á ein 3 ára sáttmála við á einum karmi á 6,95 % yvir 3 ár.
Umframt lønarhækkingina, so vórðu eisini aðrar ábøtur gjørdar í sáttmálanum.
Tað kom eisini stígur í samráðingarnar við Starvsmannafelagið, meðan verkfallið og verkbannið var, men farið varð í gongd aftur við hesar samráðingarnar fyrst í februar mánaði.
Umframt at hava samráðingar við bæði Pedagogfelagið og Starvsmannafelagið, so vóru samráðingarnar við Heilsuhjálparafelagið eisini byrjaðar.
Eftir fleiri samráðingarfundir við Starvsmannafelagið, og einum steðgi, meðan verkfallið vardi, so eydnaðist tað loksins at fáa eina semju við Starvsmannafelagið.
Skrivað varð undir semjuna tann 22. mars 2018, og nú vóru vit aftur við tann karmin, sum varð lagdur frá byrjan av. Ein tvey ára sáttmáli við einum karmi á 2,3% tað fyrra árið og 2,5 % tað seinna árið.
Eftir at hava gjørt semju við Pedagogfelagið og Starvsmannafelagið, so eru tað umframt Heilsuhjálparafelagið, sum vit eru í samráðingum við, átta onnur feløg, ið øll hava sagt sáttmálarnar upp til 1. okt. 2017.

Farið verður í holt við samráðingarnar við hesi fakfeløgini í næstum, og tey eru: Heilsurøktarafelagið, Maskinmeistarafelagið, Føroya Handverkafelag/Landsfelag Handverkaranna, Skipara- og Navigatørfelagið, Tannlæknafelagið og Føroya Arbeiðarafelag um dagrøktarsáttmálan.
Fyrst á skránni afturat byrjaðu samráðingunum við Heilsuhjálparafelagið verður Heilsurøktarafelagið.

Umframt nevndu sáttmálasamráðingar, so hevur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið eisini avtalur við onnur feløg um at fylgja sáttmálunum millum feløgini og Fíggjarmálaráðið - ein sonevndan `tiltrædelses´sáttmála.
Í nøkrum av hesum avtalum, sum t.d. við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Fysioterapeutfelagið, Ergoterapeutfelagið er harumframt avtalað, at partarnir saman skulu viðgera og taka avgerð um størv og flokkingar, ið bara eru at galda á kommunala sáttmálaøkinum.

Akademikarafelagið ynskir at gera ein líknandi avtalu við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið - ein sonevndan `tiltrædelses´sáttmála, og tað verður óivað tikið undir við eini slíkari avtalu í næstum.
Meðan aðrar, sum tann við Búskapar- og Løgfrøðingafelagið er ein avtala, um at fylgja tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála. Har er talan ikki um at flokka størv serstakt millum partarnar.

Kost- og Føðslufelagið hevur eisini heitt á Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um at gera sáttmála ella avtalu um `tiltrædelses´sáttmála.
Tað verður nokk eisini í hesum førinum talan um ein `tiltrædelses´sáttmála, men við møguleika at gera serstakar flokkingar á kommunala økinum, eins og hjá t.d. Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.



**3**

***Verkfall og verkbann***

Eftir eina miseydnaða semingsroynd tann 9. desember 2017, gjørdi Pedagogfelagið av at lýsa verkfall fyri leiðarar og varaleiðarar á dagstovnaøkinum og í dagrøktini á kommunala økinum, samstundis sum verkfall varð lýst fyri eindarleiðarar, leiðarar og samskiparar á stovnum undir landinum.
Nevndin í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum tók eftir samskifti við limakommunurnar og eftir ein fund við leiðandi starvsfólki í umsitingunum avgerð um, at tá kommunurnar ikki

við vissu vita, hvørjar ítøkiligar avleiðingar tað kundi fáa, at eingin leiðsla er á staðnum, so var tað ikki ráðiligt at hava stovnarnar opnar í fleiri dagar uttan nakra leiðslu.
Aftursvarið hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum var tí at lýsa verkbann fyri námsfrøðingar og hjálparfólk á dagstovnaøkinum, og verkbannið fekk gildi frá 14. desember 2017.
Verkfallið, sum Pedagogfelagið lýsti fyri pedagogar á Almannaverkinum – serstovnaøkinum - varð seinni hert, og ikki bar til at semjast um undantøk í mun til galdandi avtalu um undantøk, sum partarnir gjørdu í sambandi við sáttmálasamráðingarnar í 2015. Ósemjan um undantøk førdi við sær tvey gerðarrættarmál.
Støðan var sera spent, tí tað vóru tey `veikastu` á stovnunum undir Almannaverkinum og familjur teirra, ið vórðu harðast rakt, og fleiri av teimum, ið búgva á bústovnunum vórðu send til hús – úr stovninum, sum er at meta sum teirra heim.
Hetta var eitt tíðarskeið við nógvum órógvi og ampa serliga hjá landinum, men tað merktist eisini úti í kommununum.
Ørkymlaði foreldur at børnum á serstovnaøkinum og felagsskapir heittu á partarnar, um at finna eina loysn.
Tá verkbannið varð lýst, avgjørdi Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, at lønir ikki skuldu gjaldast út undir arbeiðssteðginum. Hetta fingu kommunurnar boð um, og fleiri kommunur tóku stig til at steðga lønini. Nakað upp undir jól avgjørdi Fíggjarmálaráðið at bíða við lønarfrádrátti til aftaná arbeiðssteðgin. Hetta og tað, at Pedagogfelagið ikki fór at gjalda samsýning til limir raktir av arbeiðssteðginum førdi við sær, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið beint fyri jól valdi at heita á

kommunurnar, um at gjalda lønir til starvsfólk í arbeiðssteðgi. Kunnað varð samstundis um, at lønarfrádráttur skuldi gerast í sambandi við lønarflytingina við endan av januar mánaði.
At kunning fyrst fór út, um at kommunurnar skuldu steðga lønini, og at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið síðani broytti støðu, skapti nakað at rumbli. Hóast omanfyri nevnda metti Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, at hetta var tað rætta at gera í tí støðuni, sum kommunurnar vóru í um hetta mundi.
Kjak hevur eftir arbeiðssteðgin verið um heimildina at gjalda løn undir verkfalli og verkbanni, og § 52 fyrispurningur hesum viðvíkjandi hevur verið reistur í Løgtinginum.

**4**

***Evnisdagar og skeið í samráðing o.a.***

Í mai mánaði varð skipað fyri samráðingarskeiði við Charlotte Flach, ið er ein danskur advokatur, ið hevur drúgvar royndir innan samráðingar, og sum m.a. skipar fyri skeiðum í samráðingum.
Skeiðið varð boðið út til bæði politikarar og starvsfólk í umsitingunum hjá kommununum, og tað var eitt fullsett og væleydnað skeið.
Harumframt var eisini ein dagur saman við Charlotte Flach skipaður saman við nevndini og starvsfólkunum í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sum ein liður í fyrireikingunum til samráðingarnar.
Í juni 2017 luttók Kommunala Arbeiðsgevarafelagið eisini á eini samráðingarráðstevnu í Snekkersten í Danmark fyri at kunna okkum um, hvussu seinastu samráðingar á kommunala og

almenna arbeiðsmarkaðinum hava gingið í Danmark, og hvørjar avbjóðingar tey hava havt í mun til samráðingarnar hesaferð, og fyri at fáa nærri innlit í samráðingarstøðuna í Danmark sum heild.
Hetta var eisini ein liður í fyrireikingararbeiðinum til sáttmálasamráðingarnar í 2017.

Tiltak um tænastumannaeftirmannalønir
Í mars mánaði skipaði Kommunala Arbeiðsgeverafelagið fyri einum tiltaki um tænastumannaeftirlønir
Bjarni Mortensen, sum tá var í farloyvisstarvi hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, greiddi á tiltakinum frá høvuðsprinsippum í tænastumannasetanum, og serliga eftirlønarskipanini, ið er knýtt at at tænastumannasetanini.
Greitt varð frá lógargrundarlagnum, rættindum v.m. Eisini varð samanborið við t.d. setanir, ið er tænastumannalíknandi.
Tiltakið varð serliga ætlað starvsfólkum í kommununum, ið hava starvsfólk við tænastumannarættindum.
Tiltakið var fullteknað og eydnaðist væl.

## 5
## *Arbeiðsbólkar, nevndir o.a.*

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er partur í ymiskum nevndum og arbeiðsbólkum, harímillum kunnu vit nevna, at vit hava umboð í arbeiðsumhvørvisráðnum og í lønarnevndini. Harumframt arbeiða vit eisini saman við fakfeløgunum á ymiskum øðrum frontum m.a. við at fáa greiðar ásetingar um lønir til loðsar inn í viðkomandi sáttmálar, umframt at vit eisini

arbeiða við at endurskoða lønarbygnaðin í kommunala geiranum o.a.

Lønarnevndararbeiðið hevur tikið nógva orku, og hevur havt nógv fundarvirksemi við sær í 2017. Landsstýriskvinnan við Fíggjarmálum hevur lagt nógva orku í at fáa nevndina at virka í 2017. Súsanna Olsen, námslektari á Fróðskaparsetur Føroya varð sett sum forkvinna í nevndini. Hennara fyrsta uppgáva varð at fáa partarnar saman og at fáa orðað ein arbeiðssetning. Nógv tíð varð brúkt til at fáa semju millum partarnar um sjálvan arbeiðssetningin, sum skal liggja sum grundarlag fyri arbeiðinum. Arbeiðssetningurin í 2017 var, at partarnar skulu lýsa almennu lønarskipanina, og viðgera møguleikar fyri at gera eina nýggja og felags lønarskipan. Lønarskipanin í dag er ikki ein felags lønarskipan, heldur er talan um áleið 30 ymiskar skipanir, sum eru eitt úrslit av sjálvstøðugu samráðingunum hjá teimum áleið 30 almennu fakfeløgunum.

Lønarnevndin skal lýsa verandi skipan við at hyggja nærri at t.d.:

- Lønini hjá ymisku fakbólkunum, býtt á starv og útbúgving
- Hvat er løn (mánaðarløn, ískoyti, yvirtíð o.a.)
- Hvussu verður løn ásett ( útbúgving, starvsinnihald, ábyrgd, útboð og eftirspurningur o.a.)
- Rekruttering og fasthaldan av verandi arbeiðsmegi

Fyri at finna útav, hvussu ein møgulig nýggj lønarskipan kann síggja út, má ein taka hædd fyri, hvussu samráðingarnar eru skipaðar í dag, og hvussu ein hóskandi samráðingarskipan kann síggja út frameftir.

Lønarnevndin skal kanna:

- Um sáttmálar og avtalur á almenna/kommunala arbeiðsmarknaðinum skapa hóskandi karmar fyri at kunna

broyta og endurnýggja verandi samráðingarskipan soleiðis, at arbeiðsmarknaðurin kann røkka sínum endamáli.

Lønarnevndin skal:

- Samanbera ymisku sáttmálarnar (líkheitir/frávik)
- Arbeiða við eini størri harmonisering av setanarviðurskiftunum

Lønarnevndin arbeiddi útfrá omanfyri nevnda arbeiðssetningi fram til, at innleiðandi samráðingarnar í 2017 byrjaðu. Tá samdust partarnir um, at arbeiðið í lønarnevndini skuldi steðga meðan samráðingarnar á almenna- og kommunala sáttmálaøkinum eru í gongd.

Lønarnevndararbeiðið verður tikið upp aftur samráðingarumfarið 2017 – 2019.

**6**

***Flokkingarmál***

Vit eiga at hava í huga, at øll størv, sum ikki frammanundan eru flokkaði, eiga at verða flokkað, áðrenn tey verða lýst leyst alment.

Ein møgulig flokking, sum ikki greitt er ásett í einum galdandi sáttmála, krevur sambært § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini góðkenning av landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Tá tað er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, sum samráðast um sáttmálar og lønir á kommunala arbeiðsmarknaðinum, so eiga allar flokkingar og avtalur um løn- og setanarviðurskifti á kommunala arbeiðsmarknaðinum at verða sendar felagnum. Tað er týdningarmikið, at kommunurnar og interkommunalu

arbeiðsgevararnir venda sær til felagið við umbønum, um at fáa ávís størv flokkað.
Vanliga mannagongdin er, at arbeiðsgevararnir senda umbønirnar, um at fáa størv flokkað til felagið, sum síðani tekur tað upp við avvarðandi fakfelag, og so verður møgulig umbøn um góðkenning av flokking send Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar.

Í 2017, eftir at semja er gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, samráðast Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar nú um flokkingar á eldraøkinum, um hvussu leiðarar/deildarleiðarar, visitatorar o.o. starvsfólk, ið starvast á eldraøkinum hjá kommunum skulu flokkast. Hóast Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fylgir omanfyri nevnda sáttmála, so er sum áður nevnt ein avtala gjørd um, at starvsflokkingar á eldraøkinum hjá kommunum skulu flokkast serstakt millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar.
Samráðingarnar um flokkingar við Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar eru í gongd, og tað hevur verið trupult at fáa flokkingarnar á eldraøkinum upp á pláss, men nú gongur framá, og vónandi verður ein semja gjørd um hesar flokkingarnar skjótt.

Av øðrum flokkingum í 2017 kunnu vit m.a. nevna flokkingarnar av kommunustjóra, skrivstovu/bókhaldsstørvum úti í kommununum, umflokkingar av starvsfólki hjá SEV v.m.

Fleiri fyrispurningar hava eisini verið um starvslýsingar, tá størv skulu lýsast leys, og hvar starvsfólk skulu flokkast o.a.

**7**

***Evnisdagur um sáttmálar á eldraøkinum***

Arbeitt hevur verið miðvíst út frá visjónsarbeiði okkara og ætlanunum, um at skipa fyri sáttmáladøgum fyri starvsfólk, ið starvast á eldraøkinum, umframt starvsfólk í umsitingunum.

Eftir, at eldraøkið varð flutt til kommunurnar, so hava fleiri broytingar verið bæði í bygnaði, størvum v.m., og tað hava verið nógvir fyrispurningar um ivamál í teimum ymisku sáttmálunum á økinum.

Ætlanin hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum var at skipa fyri einum evnisdegi um sáttmálar á eldraøkinum fyri m.a. at fara ígjøgnum allar relevantu sáttmálaorðingarnar á økinum. Greiða frá felags orðingum, munin á teimum ymisku orðingunum, og skapa eitt netverk fyri tey ymisku samstørvini í arbeiðsgevarahøvi, og ikki minst at fáa innlit í arbeiðsviðurskiftini/støðunar, sum starvsfólkini eru í og tær avbjóðingar/spurningar, sum ávísar ásetingar í teimum ymisku sáttmálunum kunnu geva leiðslunum og starvsfólkum á økinum.

Á heysti 2017 varð síðani lýst við hesum evnisdøgum um sáttmálar á eldraøkinum, og tað vóru íalt tríggir evnisdagar, ein í Fuglafirði, tveir í Havn, og tá avtornaði høvdu 130 fólk verið við á hesum  evnisdøgunum.




## 8

***Visjónsarbeiðið***

Dentur verður alla tíðina lagdur á at menna visjónsarbeiðið í felagnum. Endamálsorðingar verða endurskoðarar soleiðis, at vit hava eina felags fatan av, hvat vit skulu, og hvørja leið vit skulu fara.

Av raðfestu evnunum í visjónsarbeiðinum í 2017 kunnu nevnast m.a. evnisdagar um samráðingar, sáttmálar á eldraøkinum, samráðingarskeið, lønarnevndararbeiði, sálarligt arbeiðsumhvørvi, førleikamenning o.a.

Eitt av málunum í 2017, og eisini frameftir er, at vit fara at venda okkum til eigararnar, kommunurnar o.o. fyri at tryggja, at arbeiðið hjá felagnum er í tráð við ynskini hjá eigarunum og kommununum, og at arbeitt verður í tráð við viðtøkur felagsins.

Sáttmálasamráðingarnar halda fram í 2018, og tað kemur eisini at taka ein stóran part av arbeiðsorkuni.

Ein arbeiðsætlan er gjørd fyri 2018, og umframt samráðingarnar, sum eru fyri framman, fara vit m.a. at raðfesta fyriskipan av

skeiðum og evnisdøgum. Ætlanin er at skipa fyri evnisdøgum um:

- Samskifti millum politisku leiðsluna í kommunala geiranum og fyrisitingina, umframt serstakt undantiltak saman við nevndini
- Hvussu leiðslur eiga at handfara broytingar á almennum arbeiðsplássum
- Sáttmálaviðurskifti í dagrøktini fyri dagrøktarleiðarar
- Sáttmálar á dagstovnaøkinum fyri dagstovnaleiðarar og umsitingum

Harumframt verða hesi evni eisini raðfest:

- Samráðingarstevnan mai 2018
- Fyrireika skeið í starvsfólka- og arbeiðsrætti
- Førleikamenning
- Felags alment lønarlag

Arbeitt verður víðari við visjónsarbeiðinum, og við at útgreina endamálsorðingina(missiónina) og strategiina fyri 2018, so aðrar raðfestingar kunnu koma fram um omanfyristandandi.

## 9

## *Skrivstovan*

Í 2017 hevur nakað av útskifting verið á skrivstovuni. Marin á Brúnni kom aftur úr barsilsfarloyvi 1. mai, og Bjarni Mortensen, sum var í farloyvisstarvinum fór útaftur í Fíggjármálaráðið.
Í desember varð Una Djurhuus Christiansen sett sum fulltrúi, og Rannvá B. Magnussen, ið var í fyribils starvinum fór í annað fyribils starv.

So nú starvast trý fólk á skrivstovuni: Anita Fuglø, leiðari, Marin á Brúnni, fulltrúi og Una Djurhuus Christiansen, fulltrúi.

**10**

***At enda***

Sum tað sæst á gongdini í 2017, so hevur árið verið eitt sindur baldrut við teimum samráðingunum, sum hava fylgt nógv í ár. Tað hevur verið nógv órógv við m.a. verkfalli, verkbanni og samráðingunum sum heild, men hóast baldrutu byrjanina, so gongur framá, og vit hava nú skrivað undir semju við Pedagogfelagið og Starvsmannafelagið, umframt at vit nú eisini eru í holt við aðrar samráðingar, og væntandi fáa vit skrivað undir fleiri semjur ta komandi tíðina.

Umframt at samráðast, so hava vit ráðgivið og vegleitt kommununum og interkommunalu felagsskapunum í ymiskum viðurskiftum viðvíkjandi starvsfólka- og setanarmálum og sáttmálaspurningum, flokkingum o.ø.

Skipað varð eisini fyri skeiðum, evnisdøgum og tiltøkum.

Av tí, at tað ikki eydnaðist at skriva undir fleiri semjur í 2017, so fer ein stórur partur av arbeiðsorkuni í 2018 eisini til samráðingar, men vit fara eisini í 2018 at leggja serligan dent á at fyrireika og skipa fyri evnisdøgum og skeiðum.

Takk fyri.

Tórshavn 4. apríl 2018

Annika Olsen, forkvinna